Skrivstovulærlingur

Læruplássið
Læruplass, sum skrivstovulærlingur innan fyrisiting, er leyst at søkja í Norðurlandahúsinum. Umsóknin skal merkjast **»Skrivstovunæmingur«**.

Førleikakrøv
Vit vænta, at umsøkjarin hevur lokið HH, HF, students- ella FHS-prógv. Tað er ein fyrimunur at hava góðan málkunnleika umframt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og er áhugaður í mentanarligum virksemi.

Setanar- og lønartreytir
Viðkomandi verður settur eftir reglunum um skrivstovulærlingar í lønarsáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið/Yrkisdepilin. Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja 1. mars 2002.

Umsókn
Umsóknin má verða Norðurlandahúsinum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2002.

Norðurlandahúsið í Føroyum er mentanarstovnur hjá Norðurlanda Ráðnum og Føroya Landsstýri.

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Postboks 1260 · 110 Tórshavn
Tlf. + 317900 · Telefax + 319790
e-mail: nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo

Norðurlandahúsið í Føroyum er mentanarstovnur hjá Norðurlanda Ráðnum og Føroya Landsstýri.

Frá Oyndarfjarðar kommunu

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara fyri dagrøktarleiðaran í 1/2 ár frá 28. januar til 28. august 2002.

Talan er um starv, sum av kommununi er normerað til 40% arbeiðstíð, t.v.s. 16 tímars arbeiðsviku og hava umsøkjarar við pædagogútbúgving fyrimun.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pædagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið eru at fáa frá Eriku L. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 444783.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Møguligar umsóknir saman við prógvum og viðmælum skulu verða

Oyndarfjarðar kommunu,
att. Árna Joensen, borgarstjora

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. januar 2002 kl. 15.00.

Oyndarfjørður, tann 10. januar 2002
Oyndarfjarðar kommuna

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tórshavnar kommuna sóknast eftir húsum til barnagarð

Sum liður í at nøkta tørvin á barnagarðssplássum í kommununi, ætlar kommunan at útvega sær hóskandi hús.

Okkum tørvar hús, ið lúka hesi krøv, at:
- húsini eru í góðum standi við eini gólvvídd, sum er í minsta lagi 360 fermetrar
- grundøkið er stórt
- atkomuviðurskiftini eru góð
- møguligur kjallari ikki er undir jørð
- húsini helst standa í barnavinarligum grannalagi, tætt við fríøki

Áhugaði kunnu venda sær til Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60. Tórshavnar kommuna, Boks 32, 110 Tórshavn. Øll tilboð verða viðgjørd í trúnaði.

SNARSKIVAN

Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Hugnakvøld

Sandoyar sýslu javnaðarfelag hevur hugnakvøld í Dali tann 19. januar kl. 19.00 fyri øllum javnaðaráhugaðum.

Skipað verður fyri sangi, frásøgn, upplestri, harmonikuspæli og farið verður upp á gólv.

At fáa verður kalt borð – sjálvtøkuborð – kaffi og køkur. Tiltakið er ókeypis.

Við vera umboð fyri javnaðarflokkin á løgtingi og floksleiðsluna.

Tey, sum ynskja at luttaka, biðjast at siga frá á einum av hesum máltráðum: 361115, 361093, 361334, 361139, 361206, 361452, 361404 helst áðrenn 16. januar.

Javnaðarfelagið

Í kvøld

16. januar á Café Natúr
(til og við sunnudagin 20. januar)

Brian Young

framførir tónleik frá 60 unum - 90 ini líka frá:

The Beatles og Creedence Clearwater Revival til Bob Dylan, van Morrison, Crowded House osv.

livandi tónleikur

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

Aðalfundur

Tórshavnar Ítróttarráð hevur aðalfund mánadagin 28/1-02 kl. 19.00.

Nevndin

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2720, P/F Krúnborg, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Innkomin sum stjóri:
Petur Háberg Jacobsen, Viðargøta 36, 160 Argir.

Skráseting Føroya tann 11. januar 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3246, Sp/f J. E. Export, 370 Miðvágur.

Viðtøkur broyttar: 20.12.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 20.000,00 til kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 20.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 11. januar 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1062, P/F Formula.fo, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 30.11.2001.
Kapitalur:
Partapeningur kr. 14.657.500,00 Flokkar A: kr. 14.137.500,00 og B: kr. 520.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn (formaður) og Regin Joensen, Argjaboðagøta 32a, 160 Argir.
Innkomin í nevndina sum formaður: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Óli Meinertsson Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Innkomin sum stjóri: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 11. januar 2002

Kristin Balle

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VW-TRANSPORTARI
árg. 87, motorur og gearkassi ok. Til sølu sum eykalutir.
Tlf. 442002

TOYOTA COROLLA
frá 6/92 til sølu. Sær gott út og er í góðum standi. Sportfelgur fylgja við.
Tlf. 448518 ella 227770

OPEL ASTRA 2.0i
diesel, árg. 12/97, koyrt 60.000 km, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 260522 - 224808 - 310614

FORD ESCORT 1,8i
árg. 96, til sølu fyri 67.000 kr. Koyrt 86.000 km. Í sera góðum standi.
Tlf. 421010 ella 449930, lok. 21

TIL SØLU
VW LT35 til sølu fyri 4.000 kr. Hevur góðan motor.
Tlf. 253221

FORD ESCORT
1,8 diesel til sølu.
Tlf. 216626, e. kl. 16

OPEL ASCONA
árg. 87 til sølu fyri 2.000 kr. til eykalutir.
Tlf. 447207 ella 217207

EYKALUTIR TIL MAZDA
Eykalutir til Mazda 323, árg. 87-89, 3 hurðar, alt kann brúkast.
Tlf. 251439

YNSKIST
Plátudeilir til Carina II 89-91 framman.
Tlf. 220413

CHEVROLET
6.2 diesel, vøru/kassavognur, árg. 88, koyrt 125.000 km, til sølu fyri 60.000 kr.
Tlf. 315062

OPEL ASTRA 1,6 CLUB
2 ára gamal, koyrt 16.000 km, til sølu. Boð ynskist.
Tlf. 317544, e. kl. 18

FORD MOTORUR
Eg leiti eftir einum Ford Escort motori. Kanst tú hjálpa mær, so ring á
tlf. 226662

VW GOLF III TD 1,9
árg. 92, við nýggjum motori, koyrt 4.000 km, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 375186 - 222893

TIL SØLU
Fýra alufelgur v/ 4 holum, 100 mm v/ dekkum, 195/50-75, lítið brúkt, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 223370 ella 311598, e. kl. 17

MOTORUR
til Mazda 323 1,3 til sølu.
Tlf. 252072

HONDA ACCORD
frá nov. 95, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 455862

MAZDA 323,, 1300
Árg. '85, koyrir væl, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 224594

TIL SØLU
Vælhildin Opel Astra I stationcar, reyður, til sølu. Árg.10/97. Koyrt 33.500 km.
Telefon 457226

TIL SØLU
Mercedes 280 SE bíliga til sølu.
Tlf. 261538

MAZDA 6216 GLX 2.0
Hatchback, árg. 84, automatgear, koyrt 122.000 km. Krevur ymiskar ábøtur. Hevur nýggjari bensintanga, svingarmar, akkumulator o.m.a. Prísuppskot: 6.000 kr.
Tlf. 316392

SUMMARDEKK
Fýra næstan nýggj summardekk, 185x60-14, til sølu.
Tlf. 374210, e. kl. 17

MAZDA 323
árg. 89, við skaða, til sølu.
Tlf. 223508 / 442192

DAEWOO
Ein grønur Daewoo Nubira st.car til sølu, koyrt 25.000 km, fýra summarfekk á felgum fylgja við.
Tlf. 258052 ella 451024

SKODA FABIA
frá apríl 2001 til sølu vegna flyting.
Tlf. 217368

TIL SØLU
Suzuki Swift, árg. 88, bert koyrt 44.000 km., í góðum standi. Nýsýnaður. Ongan kross. Til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 310735 ella 214601

TOYOTA CARINA II
Árg. 1986, til sølu. Koyrir væl, men treingir til ábøtur, kann eisini brúkast sum eykalutir.
Ring 218744

OPEL ASTRA ST. CAR
til sølu. 1.7 diesel, 8/95, 132.000 km. Hevur sleipikrók, sær gott út. Hevur sportfelgur. Fýra dekk á felgum fylgja við.
Tlf. 283948

VW GOLF
árg. 88, 160.000 km, nýsýnaður og nýlakeraður.
Tlf. 250335

SUZUKI ALTO
frá juli 1999 til sølu, koyrt 43.000 km.
Tlf. 320140

VW GOLF GL
diesel, árg. 1991, í góðum standi til sølu.
Tlf. 447827

HYUNDAI GALLOPER
árg. 99, koyrt 60.000 km. Bilurin hevur sjey sitipláss og sær gott út, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 250440

OPEL KADETT 2.0 GSI
Svartur, koyrt 177.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 215414

OPEL KADETT E3
diesel, bíliga til sølu. Áhugaði kunnu ringja millum kl. 12-13 á
tlf. 455861

TOYOTA CAMRY 2.2
aut., árg. 95, km 65.000, nýsýnaður og nýlakeraður.
Tlf. 320606 ella 223993

COROLLA TIL SØLU
árg. 91, 3d, bilurin er nýsýnaður og sær sera gott út í lakkinum, hevur 15" alufelgur við nýggjum dekkum.
Tlf. 220004

MAZDA 323
árg. 88 bíliga til sølu.
Tlf. 361807

MITSUBISHI PAJERO
Mitsubishi Pajero, árg. 89.
Tlf. 215308

TIL SØLU
Galesja – glasfipurkápa til vøruvogn – 150 cm. breið og 192 cm. long.
Tlf. 422522

SUZUKI SJ 413
4 x 4, árg. 1987, hevur ongar plátur, men er í góðum standi.
Tlf. 422522

PEUGEOT 206 XT
til sølu, árg. 2000. Hann hevur koyrt 13000 km. Ring á
tlf. 251090 e. kl. 17

TIL SØLU
Opel Vecka 17 TD, árg. 11/96, til sølu. Bilurin hevur koyrt uml. 96.000 km, hevur sportsfelgur, er vælhildin.
Tlf. 217790, e. arbeiðstíð

CITROEN XANTIA 2.0 HDI
árg. 2000 v/ nógvari eykautgerð, el-rútar, servostýring, sentrallás, hita í setrinum, auto airkonditión, regnsensor. Teldustýrt fjaðrasystem, 15" alufelgur + pikadekk á felgum og nógv annað til sølu.
Tlf. 449934 ella 226776

MAZDA 2,0 I
árg. 09/86, sýnaður 18. juli 2001, til sølu fyri 12.000 kr. Hevur sportsfelgur við nýggjum dekkum. Koyrir væl og sær gott út.
Tlf. 255459

Amboð

TIL SØLU
Rema snikkaramaskina til sølu.
Tlf. 314959

TIL SØLU
Brúkt Hunnebeck »let form« forskalling, 250x75 cm, 130 fermetrar.
Kaj Andreasen & Co., Tlf. 315600

Arbeiði

SØKT VERÐUR EFTIR
álítandi fólki at byrja beinanvegin. Fish & Chips, Vagliið,.
Tlf. 317405 ella 320220

WORK OVER SPRING/SUMMER
19 year old male from Scotland looking to work over spring/summer in Faroes, willing to work doing anything, mature, honest, friendly, and hardworking youngman, interested?
email kevin04yessa@aol.com

REINGERÐARHJÁLP
Álítandi og húslig kvinna søkist 4 tímar um vikuna.
Tlf. 316741, e. kl. 18

ARBEIÐI SØKIST
Maður í 30-unum søkir eftir arbeiði, hevur koyrikort. Alt hevur áhuga. Helst 10-14 tímar um dagin.
Tlf. 261538

ROYNDUR TRAILARASJAUFØRUR
ynskir arbeiði. Yvirtíð eingin forðing.
Tlf. 318892 ella 254478

ARBEIÐI SØKIST
21 ára gomul genta søkir kvældarbeiði í Havn. Hevur royndir innan m.a. handil.
Vinarliga ring á tlf: 261586

ELEKTRIKARI
søkir arbeiði í Suðuroy. Vinarliga ring aftaná kl. 17.00.
Tlf. 312027/214344

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaansing

GENTA/KONA
søkist at ansa eftir 5 ára gomlum drongi í Havn, mánadag-fríggjadag frá kl. 12.30-17.30.
Tlf. 317574

GENTA/KVINNA SØKIST
18 ár ella eldri, at heinta 6 ára gamlan drong í barnagarði kl. 16.30 og ansa eftir honum til kl. 19.30 aðru hvørja viku og annaðhvørt vikuskifti kl. 8–15.
Tlf. 310171 - 252610

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
av slagnum »Mothercare«, grønur, selar, posi, fótposi og regnslag fylgja við.
Tlf. 372333

TIL SØLU
Sera vælviðfarin Brio koyristólur við kalesju, regnslag, slag og koyriposa sum hoyrir til, til sølu.
Tlkf. 448656

YNSKIST TIL KEYPS
Weekendsong ynskist til keyps.
Tlf. 315275

TIL SØLU
Vælhildin myrkabláur/beige ternutur barnavognur v/ lift og pusslitasku av sama merki, fluguneti og regnslagi, til sølu fyri 3.500 kr. Nýprísur 6.000 kr.
Tlf. 310323 ella 251223

YNSKIST
Er nakar, sum eigur ein hokuspokus stól at selja mær, so ring
Tlf. 258402

SKANDI
barnavognur til sølu.
Tlf. 375298

BARNAVOGNUR
Lítið brúktur av slagnum Silver Cross til sølu fyri 3.500 kr. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 253062

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Bláur mynstrutur kombivognur við babylyft til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 328138

TIL SØLU
Babylift við tasku – óbrúkt – selist fyri 250 kr.
Tlf. 220272 ella 316036 um kvøldið

BARNAVOGNUR
6 mðr. gamal barnavognur og stólur, myrkabláur og hvítur, til sølu fyri 2.800 kr., eru lítið brúktir. Flugunet og regnslag fylgja við. Nýprísur 4.800 kr.
Tlf. 448595 ella 263401

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
27 fót plastbátur av slagnum Hvalvík 800, við 135 HK motori. Er væl útgjørdur.
Tlf. 375431 ella 221267

BÁTAMOTORUR TIL SØLU
Volvo Penta bátamotorur av merkinum TAD 31 til sølu. 105 HK.
Tlf. 448628, e. kl. 19

MARNA DIESEL
36 HK, til sølu.
Tlf. 218195 - 4448195

TIL SØLU
Ein Mørn Fisherman, 30 fót, til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220632 ella 441035

TIL SØLU
Furuno ekkolodd LS-6000.
Tlf. 223508 / 442192

SNELLUR YNSKJAST
Automatiskar snellur ynskjast til keyps. Helst Vágasnellur.
Tlf. 448245 ella 254842

SEKSÆRINGUR
Hevur nakar ein seksæring til sølu, sum er klárur til fiskiskap, so ring
tlf. 222774

MOTORUR TIL SØLU
Brúktur Buck 30 HK motorur bíliga til sølu.
Tlf. 312954

GEAR TIL SØLU
Borg Warner oljutrýst-gear 2.57 x 1 til sølu.
Tlf. 227989

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
hevur bingo leygarkvøldið 19. jan. kl. 20.00. Minna eykaspælið endar.
Nevndin

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 20. jan. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum tórsdagin 17. januar kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

FRÁ GLÆMUNI
Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík mikukvøldið 16. januar kl. 19. Full pláta 300 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 17. jan. kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Eitt Seiko damu gull ur burturmist í Havn, møguliga í SMS 20. des. ella á Kongabrúnni. Finninganlørn verður givin.
Tlf. 313763

BURTURMIST
Lyklaringur við tveimum lyklum burturmist nýggjársaftan á strekkinum Krossgøta-Gálgasteinur. Hevur nakar funnið lyklarnar, vinarliga ring
Tlf. 311242

BURTURMIST
Playstation 2 spæl »Fifa 2002« burturmist uttan fyri SMS (Apotekið) 28. des. Tann, ið hevur funnið spælið, vinarliga ring
Tlf. 317299 ella 257972

FARTELEFON BURTURMIST
Blá Nokia 3210 fartelefon burturmist 29.12 uppi á Nabb. Hevur tú funnið hesa, vinarliga ring
tlf. 423270

Býli

HÚS Í KOLLAFIRÐI
til sølu um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 421661

HÚS TIL SØLU
Hús í Miðvági til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 333055

ÍBÚÐ TIL LEIGU
frá 1. feb. í vesturbýnum til eitt fólk fyri 4.000 kr. um mðr. v/ ljós og varma. 1 mðr. depositum. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1258-1

ÍBÚÐ YNSKIST
Maður ynskir íbúð til leigu í Havn.
Tlf. 219610

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki